## Massa kemur fyri seg

Brasilski formel 1-koyrarin, Felipe Massa, er í ferð við at koma fyri seg, eftir at hann fekk skaða í høvdið, tá hann var fyri einum óhappi í undankappingini til Grand Prix-kappkoyringina í Ungarn. Massa liggur ikki longur á sjúkrahúsi, hóast greitt er, at hann helst noyðist undir skurð meiri enn ta einu ferðina aftrat. Nú er hann farin heim til Brasil, har hann hvílir seg og roynir at koma fyri seg.



## Illa lýddar reglur

Amerikanski rennarin á stuttu teinunum, Tyson Gay, er ónøgdur við nýggju reglurnar fyri tjóvstarti, sum koma í gildi næsta ár, og sum fara at hava við sær, at verður tú tikin í tjóvstarti, verður tú kolldømdur beinanvegin: – Eg eri bara menniskja og geri mistøk av og á. Vit, sum kappast, verða ávirkað mentalt av, at vit nú verða kolldømd beinanvegin, um vit koma til at tjóvstarta, sigur Gay.



**Palli Augustinussen og hinir í VB/Sumba máttu um vikuskiftið lata oddasessin frá sær til HB, tí tað var ikki spælandi á Vágseiði, har VB/Sumba annars skuldi spælt ímóti B68**

*Mynd: Hilmar Jan Hansen/Einslistir*

1. deild menn:

# HB aftur best av næstbest

**Illveður á Vágseiði gjørdi, at oddaliðið ikki fekk spælt, og tí gjørdi HB sær dælt av, og nú eru teir næstbestu hjá HB aftur á odda í 1. deild**

FÓTBÓLTUR
*Hilmar Jan Hansen*
*einslistir@kallnet.fo*

Í Vági var beinleiðis illveður á Eiðinum, og tí bar ikki til at fáa dystin millum VB/Sumba og B68 spældan. Tað kom ongantíð so langt, sum at dysturin var settur í gongd, og nú verður helst neyðugt at spæla hann mitt í viku.

At dysturin hjá oddaliðnum, VB/Sumba, var av ongum, gjørdi HB sær dælt av, tí teir næstbestu hjá høvuðsstaðarfelagnum eru nú eitt stig framman fyri VB/Sumba, men hava altso spælt ein dyst meira, og trý stig framman fyri tveir aðrar av uppflytingarkandidatunum, B71 og TB.

### Á odda allan vegin

HB fekk í Runavík eina dreymabyrjan, tá Tróndur Arge longu í fyrsta minutti skoraði til 1-0. Og hóast NSÍ fekk svarað aftur við máli frá Sonna L. Petersen, gekk aftur bara ein minuttur, so hevði Óli Restorff Hansen lagt HB á odda 2-1, sum eisini var hálvleiksstøðan.

Í seinna hálvleiki økti Emil Leifsson fyri HB til 3-1. Men ímóti endanum svaraði NSÍ aftur, tá Árni Frederiksberg minkaði um munin, men hóast onkrar spentar støður, komu runavíkingar ikki nærri. HB, sum stórt sæð allan dystin var á odda, vann tí 3-2.

### Forða hvørjumøðrum

Bæði B71 og TB royna at tryggja sær eitt pláss heilt har frammi, men leygardagin spentu tey bein fyri hvørjumøðrum, tá tey spældu javnt á Sandi. B71 byrjaði betur og hevði yvirvág fyrsta hálva tíman, og tað var í tráð við gongdina, at Clayton Soares skoraði til 1-0.

Men síðani mentist TB, og við tveimum tøttum málum, sum Jón Magnusarson og Dan Mortensen skutu beint fyri hálvleik, fór TB framum 2-1, sum eisini var hálvleiksstøðan.

Tá so B71 fekk ein mann útvístan mitt í seinna hálvleiki, vóru fleiri ábendingar um, at TB kundi fara við teimum trimum stigunum. Men ímóti endanum á dystinum syrgdi íslendingurin hjá B71, Guðbjørn Sæmundsson, fyri javnleikinum í nógva regninum, ið darvaði spælinum ikki søgt.

### Skála enn eina ferð

Skála, sum longu eina ferð fyrr hevði vunnið á FC Hoyvík, gjørdi tað aftur leygardagin. Talan gjørdist enntá um ein greiðan 4-1 sigur, ið ongantíð var í vanda. Hálvleiksstøðan var 2-0.

Eitt korter inn í dystin skoraði Jógvan Berg beinleiðis við frísparki, og á hálva tímanum snittaði Rói Jacobsen við høvdinum bóltin ímóti málinum, har FC Hoyvík-málverjin var óheppin, tí bólturin fór undir fótin á honum og í málið…

Í seinna hálvleiki økti Brian Jacobsen til 3-0, áðrenn FC Hoyvík fekk eitt brotsspark, sum John Eystberg setti í netið. Men hóast hoyvíkingar royndu at trýsta, gjørdist tað í staðin Arnold Berg, ið staðfesti 4-1 sigurin hjá skálamonnum.

### Eingin spenningur

Dysturin í Gøtu gjørdist ongantíð serliga spennandi, hóast tað framvegis var 0-0 í hálvleikinum. Til tað hevði MB alt ov lítið at bjóða, meðan Víkingur royndi at halda ferðini á spælinum uppi.

Stutt inn í seinna hálvleik brast fyri nev, tá Rúni á Reynatrøð skoraði til 1-0, og miðskeiðis í hálvleikinum økti Martin Olsen, áðrenn Leivur Hansen í yvirtíðini staðfesti 3-0 sigurin hjá Víkingi.

**Støðan, 1.deild menn**

| | d | v | - | j | - | t | v mál | t mál | +/- | stig |
|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|
| 1 HB | 19 | 10 | - | 5 | - | 4 | 40 | 23 | +17 | 35 |
| 2 VB/Sumba | 18 | 10 | - | 4 | - | 4 | 37 | 29 | +8 | 34 |
| 3 B71 | 19 | 9 | - | 5 | - | 5 | 40 | 30 | +10 | 32 |
| 4 TB | 19 | 9 | - | 5 | - | 5 | 36 | 32 | +4 | 32 |
| 5 FC Hoyvík | 19 | 9 | - | 1 | - | 9 | 28 | 31 | ÷3 | 28 |
| 6 B68 | 18 | 8 | - | 3 | - | 7 | 45 | 35 | +10 | 27 |
| 7 NSÍ | 19 | 7 | - | 4 | - | 8 | 36 | 39 | ÷3 | 25 |
| 8 Víkingur | 19 | 6 | - | 6 | - | 7 | 28 | 26 | +2 | 24 |
| 9 Skála | 19 | 5 | - | 3 | - | 11 | 23 | 31 | ÷8 | 18 |
| 10 MB | 19 | 2 | - | 2 | - | 15 | 23 | 60 | ÷37 | 8 |